# andi ein fólkaogn í Føroyum



*– At ovastevnan ber til, er eitt tekin um, at fólk trívast og eru góð við staðið, men hetta er eisini eitt tekin um, at fólk duga at samstarva, segði Hildur Eyðunsdóttir. Myndin er av teimum mongu bátunum, sum vitjaðu í Nólsoy um ovastevnuna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

gestir í oynna. Eitt tiltak sum hetta, krevur stórt fyrireikingararbeiði og nógvar raskar sjálvbodnar hendur – bæði undan stevnuni, á stevnuni og eftir stevnuna. At ovastevnan ber til, má vera eitt tekin um, at fólk trívast og eru góð við staðið, men hetta er eisini eitt tekin um, at fólk duga at samstarva.

Hildur vísti á, at Nólsoyarbygd er í eini serstøðu í mun til bygdirnar á hinum smáu oyggjunum, tí her er grundarlag fyri vøggustovu, barnagarði og skúla.

– Fólk vilja seta búgv her, og hetta er fyritreytin fyri, at nøkur menning kann vera.

Hon segði, at Nólsoy er søgurík bygd, men bygdasavnið hevur tørv á munandi betri kørmum at virka undir, um søguligir dýrgripir skulu varðveitast. Í bygdini er ríkt mentanarlív og frítíðarvirksemi, sum somuleiðis er við til at skapa trivna í oynni. Her er bæði kór, sjónleikur, ítróttarfelag og mangt annað.

– Hóast man kundi ynskt sær meira vinnuligt virksemi í oynni, so er tað ikki heilt sørt, og onkrar ætlanir eru í umbúna, eitt nú innan ferðamannavirksemi.

Hildur segði, at í hennara huga er betri dagligt ferðasamband um Nólsoyarfjørð tað týdningarmesta, sum eftir er hjá nólsoyingum at fáa uppá pláss – og sjálvandi má tað bera øllum til at ferðast um fjørðin. Ferðasambandið er ikki nóg gott, so leingi fólk, ið bera brek, ikki kunnu ferðast eins væl og onnur.

– Við betri ferðasambandi hava tey, sum búgva í Nólsoy, eins góðar fyritreytir at liva eitt nútímans lív sum aðrastaðni í landinum. Men við tað, at fjørðurin skilir Nólsoy frá Havnini, so ber tað eisini til at liva heilt øðrvísi í Nólsoy.

Í røðu síni vísti hon eisini á sangin, "Tað er í Nólsoy, eg vil búgva – her er so friðarligt og stilt", sum Janus Nolsøe syngur í SvF.

– Eg skilji hann væl, tí Nólsoy er eisini ein hugnalig og spennandi bygd og eftir mínum tykki heilt serlig í føroyskum høpi. Her búgva ógvuliga ymisk fólk, og eg havi varhugan av, at tað er eitt, sum dregur nógvar nýggjar tilflytarar. Her møtast nútíð og fortíð, tað bygdasliga og býarliga, og tað er hetta, sum er so sjarmerandi við Nólsoy, sæð við gestsins eyga, helt hon fyri.

Hildur duldi ikki fyri, at nógv er hent í Nólsoy seinastu árini.

– Eg las um Nólsoyar kommunu í frágreiðingini um kommunurnar í Føroyum, sum varð skrivað í 1998. Her sá eg, at kommunan hvørki hevði dagansingarstovn ella dagrøkt. Fyri nøkrum fáum árum síðani fekk kommunan tó barnagarð, sum heldur til í leigaðum hølum, og um árskifti letur upp nýggjur dagstovnur við vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

Hon segði, at oyggin eisini skal vera royndaroyggj innan reina orku.

– Hetta er sera áhugavert. Ætlanin er, at Nólsoygging í framtíðini fær allan sín orkutørv frá varandi orkukeldum, og at eitt royndarverk til vetnisframleiðslu skal byggjast. Tað var tí heldur einki náttúrligari fyri býráðið enn at avgera, at barnagarðurin, sum er í gerð, skal brúka sólorku.

Hon segði, at gongst sum ætlað, kann Nólsoyggin soleiðis fáa ein týðandi leiklut í framtíðar orkupolitikk Føroya.

– Eg haldi, at avgerðin um Nólsoy sum orkuroyndaroygg, átti at verið fylgd upp við einari kommunalari ætlan um Nólsoy sum grøna oyggin burturav – ein oygg, har umhvørvið verður sett í hásæti á øllum økjum. Eg ivist ikki í, at eitt slíkt stig eisini hevði gjørt sítt til, at fólk gjørdust enn meiri áhugað í at vitja og búseta seg í Nólsoy, segði Hildur Eyðunsdóttir í setanarrøðu síni á ovastevnu.



*– Eg minnist serliga væl, tá Ove 21. juli í 1984 á fyrsta sinni legði frá landi. Helt, tað riggaði so væl, tá ið Útvarpið hesa løtu spældi "I am sailing" hjá Rod Stewart, samstundis sum Ove í fagrasta summarveðri fór rógvandi út um molan, segði Hildur Eyðunsdóttir í setanarrøðu síni. Undir liðini á henni stendur maðurin, Oyvindur av Skarði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*